

**KONSERTHØLL**

*Við nýggja musikskúlanum fær Sørvágur eisini konserthøll í gamla skúla, sum fer at hýsa umleið 100 fólkum. Musikskúlin verður nú tríggjar ferðir so stórur, sum hann var, tá bert gamli skúli í bygdini var til brúks*

*Mynd: Jákup Súni Lauritsen*

# ar um og mentan



**FYRIMYNDARLIGT**

*– Bygginevndin hevur fylgt væl við verkætlanini, og vit hava havt fundir umleið 14. hvønn dag. Vit halda, at Trøðhamar hevur gjørt eitt fyrimyndarligt arbeiði, sigur Jákup Súni Lauritsen, formaður í bygginevndini*

## Vit hava havt listarmannin, Pól Skarðenni, at hjálpa okkum við vali av litum

JÁKUP SÚNI LAURITSEN

at hjálpa okkum við vali av litum, sigur hann.

### Áhugavert umhvørvi

Jákup Súni Lauritsen sigur, at umframt musikskúlan, hornorkestrið og tónleikalívið í Sørvági annars kemur eisini skúlin, sum liggur hinumegin Kirkjá og hýsir øllum skúlaflokkum, eisini at kunna brúka hølini í tann mun, tey eru tøk, og brúk verður fyri tí.

Hann sigur, at ein umleið 12 metrar long brúgv kemur úr túninum á musikskúlanum tvørtur um ánna og yvir á skúlavøllin.

– Saman við fimleikarhøll skúlans og svimjihylinum verður hetta soleiðis eitt áhugavert skúla- og mentanarligt umhvørvi við nógvum ymiskum møguleikum innan undirvísing, frítíðarvirksemi og mentanarlig tiltøk av ymiskum hugsandi slagi, sigur Jákup Súni Lauritsen.

Hann leggur aftrat, at nakað av grótlaging eisini fer fram á økinum, eins og lagað verður uppundir Kirkjá.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Sørvágur umhugsar at byggja ítróttarhøll



*Jákup Súni Lauritsen er formaður í teknisku nevnd hjá Sørvágs kommunu, sum nú hevur fingið til uppgávu at finna eitt egnað økið til bygging av ítróttarhøll í bygdini*

**BYGGING Tekniska nevnd hjá Sørvágs kommunu hevur nú fingið álagt at leita eftir einum egnaðum øki í bygdini til bygging av ítróttarhøll**

Vilmund Jacobsen

Sørvágs kommuna hevur samtykt at leita eftir einum øki til ítróttarhøll í bygdini.

Samtyktin, sum kommunan hevur gjørt, snýr seg um, at tekniska nevnd í kommuni skal arbeiða við at finna eitt øki, sum er egnað til hallarbygging.

Jákup Súni Lauritsen, sum er formaður í teknisku nevnd, sigur, at enn er málið komið stutt áleiðis, men hann væntar, at ætlanin at fremja eina slíka bygging kortini ikki liggur so langt frammi.

Sørvágs kommuna er rímiliga væl fyri fíggjarliga, og nettoskuldin er bert umleið ein triðingur av árligu skattainntøkunum.

### Stór íløga

Jákup Súni Lauritsen sigur, at ein slík ítróttarhøll, sum nú er upp á tal at byggja í Sørvági, helst fer at kosta einar 20-25 miljónir krónur.

Spurdur, um hann væntar, at hetta verður ein verkætlan, sum fer at røkka yvir fleiri ár, sigur hann, at tað væntar hann ikki.

– Eg vænti, at um vit finna eitt vælegnað øki í bygdini, og bygdaráðið annars semist um at seta eina slíka verkætlan á kjøl, fer ikki at ganga so long tíð, áðrenn ein ítróttarhøll stendur liðug í Sørvági.

Jákup Súni Lauritsen endurtekur, at enn er málið um hallarbygging í Sørvági so nýtt, men hann væntar, at Sørvágs kommuna fer at søkja um stuðul til verkætlanina, har nakað kann verða at heinta.

*vilmund@sosialurin.fo*